# Jazzkonsert í Norðurlanda-húsinum

*Føroya Jazztónleikarafelag skipar í kvøld fyri jazzkonsert í Norðurlandahúsinum, har bæði ungdómar og veteranar fara at spæla*



Tann fyrsta av fýra konsertum, sum Føroya Jazztónleikarafelag fer at skipa fyri í vetur, verður í Norðurlandahúsinum í kvøld klokkan 19.30.

Á konsertini í kvøld fara trý føroysk jazzættarlið á pallin. Stamen Stanchev og Edvard Nyholm Debes fara at spæla saman við tónleikarum úr bólkunum Jazzarnir og Tangz. Konsertin verður bygd á smærri bólkar og solistar.

Í jazztónleikinum er vanligt, at tónleikararnir royna at finna nýggjan íblástur við at spæla kendar skráir við nýggjari instrumentsamanseting. Tí verða Edvard Nyholm Debes og Stamen Stanchev at hoyra í kvøld saman við tónleikarum úr Jazzarunum og Tangz, verður sagt í tíðindaskrivi frá Føroya Jazztónleikarafelag.

**ej**

# 102 ár

Í dag fyllir elsti føroyingurin, Jógvan Andreas Hansen í Vestmanna, 102 ár.

Hóast sín høga aldur er Jógvan rættiliga birgur. Hann er likamliga væl fyri, men hoyrnin bilar kortini.

Jógvan er frammi hvønn dag og fylgir við tí, sum hendir rundan um hann. Situr við vindeygað við kikaranum og fylgir við, hvør kemur og fer eftir vágni, og hvør landar til flakavirkið.

Jógvan er føddur í Miðvági, men kom ungur til Vestmanna, eftir at bæði foreldrini doyðu frá fimm synum.

Sum so mangur annar føroyingur var Jógvan sjómaður í mong ár, men legðist uppi í 1949. Hann arbeiddi seinni hjá SEV og Vestmanna Kommunu.

Jógvan var giftur við Binu, sum doyði í 1971. Tey bæði áttu trý børn. Í dag býr yngsta dóttirin, Jona, saman við Jógvani, sum enn er heima hóast sín høga aldur.

Tá Jógvan fylti 100 ár hevði Sosialurin samrøðu við hann. Hann greiddi tá frá, hvussu var við skúlagongdini, tá hann gekk í skúla. Um egna skúlagongd hevði hann ikki so nógv at siga, greiddi hann Sosialinum frá. Har var bara tað at fortelja, at hann lærdi einki. Skúlagongdin var ikki hvønn dag, men tað gjørdi einki, helt hann, tí børnini høvdu so nógv annað at gera. Tey tóku lut í og hjálptu til við øllum dagligum arbeiði, sum tá var.

Góða heilsu hevur Jógvan havt, og hevur tað framvegis. Fyri Sosialinum segði hann fyri tveimum árum síðan, at hann hevði ongantíð roykt, men tó skráað alt lívið. Og hann hevði verið avhaldsmaður, síðan hann var heilt ungur.

Eisini politiskt var hann sannførdur og rættiliga avgjørdur. Hann hevur verið á hvørjum vali og altíð valt Javnaðarflokkin.

Sosialurin ynskir Jógvani hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

**ej**



*Elsti føroyingurin, Jógvan Hansen í Vestmanna, fyllir í dag 102 ár. Sosialurin ynskir honum tillukku* *Mynd: Jens K. Vang*

# Leita eftir katamarani til Skálafjørðin



*Ongin sigling er ímillum Havnina og Skálafjørðin ímeðan Ternan er á beding í Vági. Hon er til fimm árs eftirlit og væntandi verður hon liðug seint í hesum mánaðinum*

*Strandferðslan fer nú aftur at kanna møguleikarnar at royna ein katamaran í siglingini ímillum Havnina og Skálafjørðin*

ÁKI BERTHOLDSEN

Strandferðslan hevur ikki slept ætlanini at leiga eina tvíkilju -katamaran- til at sigla ímillum Havnina og Skálafjørðin.

Nú er tað langt síðani, at tað frættist, at ætlanin var at leiga eina tvíkilju til hesa farleiðina, men so hoyrdist onki aftur.

Men málið er ikki burturdottið, tvørturímóti.

Tí nú fer Strandferðslan aftur at kanna møguleikarnar fyri at leiga eina tvíkilju- til at sigla ímillum Havnina og Skálafjørðin,

Tað fer Strandferðslan at gera, tá ið eykajáttanarlógin, sum í løtuni er til viðgerðar í tinginum, er samtykt.

Tað er alt, sum talar fyri, at hon verður endaliga samtykt seinni í hesi vikuni og tá fer Strandferðslan aftur at leita eftir eini tvíkilju.

Ein partur av uppskotinum til eykajáttanir, sum tingið viðgerð í løtuni, er at játta Strandferðsluni 3,5 milliónir.

Av teimum skulu 2,5 milliónir brúkast til útreiðslur til olju til strandfaraskipini.

Tað hevur rakt Strandferðsluna serliga meint, at oljan er dýrkað so nógv og tí er ætlanin at lata hana fáa 2,5 milliónir eyka í ár til hesar útreiðslurnar.

Tann seinasta milliónin av eykajáttanini skal brúkast til at seta „dedikeraðan radiooperatør“ umborð á Dúgvuna og á Trónd.

Talan er um fýra mans, sum Strandferðslan má seta til endamálið.

Hetta eru radiooperatørar, sum hava til endamáls at taka sær av øllum samskifti í sambandi við eina neyðstøðu, so at skiparin er fullkomiliga leysur av tí.

Hetta eru krøv, sum Skipaeftirlitið hevur sett Strandferðsluni.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfeðsluni, sigur, at sostatt hevur eykajáttanarlógin onki við Skálafjarðarsiglingina at gera sum so.

–Men vit hildu tað ikki verða rætt, at vit fóru at brúka pening til eina tvíkilju at sigla inn á Skálafjørðin, samstundis, sum vit manglaðu pening til endamál, sum eru neyðug, sigur hann.

– Men fáa vit eykajáttanina, sum alt nú talar fyri, at vit fáa, fer tað aftur at bera til at kanna málið at leiga ein katamaran at sigla á ímillum Havnina og Skálafjørðin.

Hann sigur, at í fyrstu syftu verður tað talan um at gera eina roynd at leiga ein katamaran til skálafjarðarsiglingina í ein mánaða, ella so, fyri at vita, hvussu hann roynist.

Annars er tað Ternan 1- Gamla Ternan- sum hevur røkt ferðasambandið inn á Skálafjørðin. Men í løtuni er hon til fimm árs eftirlit á Skipasmiðjuni í Vági.



# Krabbasjúklingar fáa hjálp við kostinum

*Sjúklingar við krabbameini hava ofta trupulleikar við at fáa nóg mikið og nóg góða føði, men nú kunnu sjúklingar og avvarðandi leita hjálp í nýggjum bóklingi við kostráðum*



*Jansy Gaardlykke, ráðgevandi sjúkrasystur hjá Krabbameinsfelagnum, hevur saman við Jónhild West og Margret Mortensen staðið fyri arbeiðnum at gera bóklingin við kostráðum til krabbameinssjúklingar og teirra avvarðandi.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

EYÐUN KLAKSTEIN

Ein snøggur og litfagur bóklingur skal nú geva krabbameinssjúklingum og teirra avvarðandi eina hjálpandi hond, tá tað snýr seg um kost.

Sjúklingar við krabbameini hava ofta trupulleikar við at fáa nóg mikið og nóg góða føði. Hetta kann koma av sjúkuni ella hjáárinum av sjúkuviðgerðini.

– Tað hevur stóran týdning, at bæði sjúklingurin og avvarðandi fáa ráð og vegleiðing skjótast tilber. Ein sjúklingur, ið fær nøkta tørvin á rætta kostinum og ikki lætnar, stendur seg betur ímóti sjúkingi og teimum hjáárinum, sum eru tengd at henni, siga tey, sum hava staðið fyri arbeiðnum at gera bóklingin.

Tey eru Margret Mortensen, sjúkrasystur á Landssjúkrahúsinum, Jónhild West, økonoma, og Jansy Gaardlykke, sum er ráðgevandi sjúkrasystur hjá Føroya Felag móti Krabbameini.

**Ymsir trupulleikar**

Tað kann vera torført at geva einfalda kostráðgeving til krabbameinssjúklingar, tí tað eru ymisk sløg av krabbameini, og tí eru trupulleikarnir við kosti ymiskir.

Men nýggi bóklingurin hjá Krabbameinsfelagnum roynir at taka hædd fyri teimum ymisku trupulleikunum, sum kunnu standast av sjúkuni ella viðgerðini. Bóklingurin er býttur upp í partar, sum koma við uppskotum um, hvussu teir ymsu trupulleikarnir kunnu loysast, og hvør matur hóska seg best til ymisku hjáárinini.

– Góð koststøða bøtur um líkindini fyri at hava tað gott, hóast sjúku og krevjandi viðgerð. Er maturin ikki rætt samansettur kann tað føra til óvirkni, vónloysi og tunglyndi, verður sagt í bóklinginum.

Tað er Føroya Felag móti Krabbameini, sum gevur bóklingin út.

# Skýlið komið væl áleiðis

**Klaksvík:** Arbeiðið at gera nýggja skýlið við fótbóltsvøllin í Klaksvík er nú komið so langt, at tað ber til at sessast í tí.

Betongelementini eru sett upp, og nú er eftir at innilokað skýlið. Tá tað er gjørt, verður beinanvegin farið í holt við at gera almennu toilettini, sum skulu vera í skýlinum.

Upprunaliga ætlanin var, at arbeiðið skuldi verða liðugt, áðrenn fótbóltskappingin í ár endaði, men tað eydnaðist ikki.

**42 metrar langt**

Arbeiðið at gera nýggja skýlið byrjaði í mai mánaði, og síðani hevur gingið væl. Tað kom eitt sindur upp á tvørs, at eitt verkfall í Danmark forðaði betongelementunum at koma rættstundis til Føroya, men nú eru tey komin og sett upp.

Nýggja skýlið er 42 metrar langt, og 9 røðir av áskoðaraplássum verða at seta seg á. Í fyrstu syftu verða beinkir settir upp.

Tað er Pól Kristoffur Joensen, sum stendur fyri øllum arbeiðnum við nýggja skýlinum. Klaksvíkar kommuna, KÍ, NFÍ og Áskoðarafelagið hjá KÍ fíggjað arbeiðið, sum eisini hevur fingið stuðul frá landskassanum.

**ek**

# Eyðun og Terji savna hittini

*Ein savnsfløga við bestu sangunum hjá Eyðuni Nolsøe og Terja Rasmussen kemur út um mánaðarskiftið*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í fjør gjørdu teir sína fyrstu fløgu saman, men longu nú er næsta fløgan hjá teimum á veg.

Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen verða um mánaðarskiftið aftur fløguaktuellir. Hesaferð er talan ikki um nýtt tilfar, men eitt savn av 18 teimum bestu sangunum, sum teir báðir komponistarnir og tónleikararnir hava gjørt nógvu seinnu árini.

Eyðun Nolsøe hevur gjørt sangir til millum annað Frændur, Terja og Føstufressar og sína egnu soloútgávu. Terji Rasmussen var stóri sangskrivarin í Føstufressum og Moirae, og hann hevur eisini havt ein fingur við í spælinum hjá Frændur.

Og tá teir báðir góvu sína fløgu út stutt fyri jól í fjør, skrivaðu teir sjálvandi báðir sangir og yrkingar til fløguna.



*Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen koma um mánaðarskiftið við eini savnsfløgu*

**Savna sangirnar**

Nýggja fløgan fer at fáa heitið *Eitt nummar og 17 onnur,* og tað er 3'arin sum stendur fyri útgávuni.

– Hetta er ein roynd at savna nakrar av gomlu sangunum hjá Eyðun og Terja, sum eru rættuliga spjaddir, tá talan er um útgávur, og sum allir ikki eru til at fáa hendur á longur, sigur Høgni Zachariasen, leiðari á fløgudeildini hjá 3'aranum.

– Eyðun og Terji hava spælt saman síðani 1985, og í fjør góvu teir eina fløgu út í felag. Tí er tað rættiliga upplagt at lata teir báðir verða felags um eina savnsfløgu, heldur Høgni Zachariasen.

Sangir av útgávum hjá Frændum, Føstufressum, Moirae, B36, Amnesty og øðrum verða at finna á nýggju savnsfløguni.


# Telefonbókin 2001

**Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.



*Seinasta freist at lata broytingar inn er* ***týsdagin 31. oktober 2000***

**Hvítu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerkið:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).

Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

**Gulu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

**Prísir:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| (A)+(D) | Standardlýsing | kr. | 650,00 |
| (B) | Stórt navn | kr. | 50,00 |
| (C) | Innramming | kr. | 100,00 |
| (E) | Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) | kr. | 20,00 |

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE

**att: Teleforlagið**

**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**